# Spildurnýggjur bilur til sølu

## – við stórum avsláttri



Ein spildurnýggjur reyður Ford Fiesta 1.4 Duratec 16V (5 hurðar) til sølu við stórum avsláttri.

Bilurin er frá oktober 2008 og hevur koyrt 22 km.

Nýprísur: kr. 170.000,-

**Áhugað kunnu ringja á telefon:**
**315018 ella 515018**

Vágs Kommuna

# Dagrøktari til Dagrøktarskipanina í Vágs kommunu

Dagrøktarskipanin í Vágs kommunu søkir eftir dagrøktara at byrja 1. desember 2008 í tíðaravmarkað starv fram til 10. juli 2009.

**Vit vænta at tú:**

- Hevur hegni og áhuga at ansa børnum
- Ert álítandi og hevur góð evnir til samstarv
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Ert tolin og vísir umsorgan fyri børnunum
- Neyðugt er við góðum umstøðum at ansa børnum, soleiðis at børnini eru í tryggum karmum, bæði inni og uttandura.

Arbeiðstíðin er frá kl. 7.30 til kl. 17.15 og lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri upplýsingar um starvið fast við at venda sær til dagrøktarleiðaran Irdi Bjarkhamar tlf. 374095 ella tlf. 224842.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi tann. 17. november 2008 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:
Vágs kommunu
Vágsvegur 22
FO-900 Vágur
Viðm. Dagrøktari

Vágs Kommuna

# KUNNGERÐ

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at atkvøðugreiðslan til kommunuvalið og skúlastýrisvalið í Vágs Kommunu verður

**Týsdagin 11. november 2008**

í Vágs Skúla.

Atkvøðugreiðslan verður millum:

Kl. 10.00 og kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður**
Veljarar í Vágs Kommunu, ið sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 10. november 2008.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðið, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tfl. 373024 í seinasta lagi 10. november 2008 kl. 12.00

**Valkort**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til kommunuvalið verða valkort send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá í seinasta lagið 10, november 2008 á tlf. 373024.

**Vágs kommuna**

Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

# Vinnandi tølini eru:

| | |
|---|---|
| 1. 7581 | 11. 5294 |
| 2. 0910 | 12. 2750 |
| 3. 1561 | 13. 3451 |
| 4. 5050 | 14. 5888 |
| 5. 2010 | 15. 6292 |
| 6. 0149 | 16. 3196 |
| 7. 4282 | 17. 6490 |
| 8. 6044 | 18. 0448 |
| 9. 2851 | 19. 3194 |
| 10. 4310 | 20. 5809 |

TVØROYRAR KOMMUNA

# Býráðsskrivari

Søkt verður eftir býráðsskrivara at byrja 1. januar 2009.

**Høvuðsarbeiðsuppgávur:**

- Vara av fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu stýringini í Tvøroyrar kommunu
- Planleggja, raðfesta og samskipa
- Tryggja dagligu arbeiðsgongdirnar
- Tryggja eitt gott samskifti við borgarar og viðskiftafólk
- Ansa eftir, at fíggjarætlanin verður hildin
- Ansa eftir at lógir, reglugerðir og samtyktir verða fylgdar
- Skipa fyri fundum
- Aðrar uppgávur í fyrisitingini

**Førleikakrøv:**

**Útbúgving:**

- Relevanta útbúgving, hægri útbúgving, útbúgving innan skrivstovuøkið ella líknandi førleika

**EDV: Kunnleiki til m.a. hesi forrit:**

- Journalskipan
- Tekstviðgerð
- Rokniark
- Kalendara- og t-postskipan

**Royndir:**
Ynskiligt er at viðkomandi hevur royndir innan almenna fyrisiting og innan leiðslu.

**Annað:**
Viðkomandi, ið settur verður, hevur tagnarskyldu viðvíkjandi viðurskiftum, ið kunnleiki fæst til gjøgnum starvið, eisini aftaná, at viðkomandi er farin úr starvi.

**Persónligir eginleikar:**

**Skal m.a.:**

- Vera málsøkjandi og framsøkin
- Hava bæði fak- og menniskjaligar góðar eginleikar
- Kunna virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og eggja teimum at menna tænastustøðið
- Vera trúgv/ur móti tiknum avgerðum
- Hava virðing, fatan fyri og vilja til at samstarva við ta politisku skipanina

**Løn:**
Starvið verður lønt samb. sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir v.m. skulu vera Tvøroyrar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 1. des. 2008 kl. 15.00.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristin Michelsen, borgarstjóra á tlf. 37 10 85 ella tlf. 22 11 91.

Umsókn skal sendast til:
Tvøroyrar kommunu
Tvørávegur 37
800 Tvøroyri

Sosialurin
www.sosialurin.fo